tíðindablaðið sosialurin

Telefon 1 18 20
Argjavegur 26, 3800 Argir
Postsmoga 76, 3800 Tórshavn

Útgevari: P/f Sosialurin ©
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Blaðfólk: Høgni Djurhuus
Randi Jacobsen
Tórfinn Smith
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bíligt tvætl

Í politikki er oftast fáfongt at tosa um vónbrot, og tí ber illa til at vera vónbrotin av Paula Ellefsen. Vit høvdu tó væntað av honum eitt minstamát av álvarsemi, tá hann nú hevur verið í fremstu rød í politikki í so mong ár.

VIT hugsa her um ta grein, hann hevði í Dimmalætting seinasta týsdag um verjuspurningar. Vit skulu bert taka fram tað pettið, har hann sigur um tveir av teimum stóru flokkunum á tingi, og av samanhanginum skilst, at hann her hugsar um javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin, at teir av **»heilum hjarta ganga inn fyri at gera Føroyar til eitt sosialistiskt, ella fyri alt tað eitt kommunistiskt, samfelag við øllum tí, sum harav fylgir«.**

TAÐ mest positiva, sum kann sigast um slíka talu, er at hetta er bíligt tvætl, sum illa mátti sømt seg einum fyrrverandi løgmanni. Og her man hann undirmeta lesarar sínar, so tað forslær. Vit skulu ikki her fara út í eina longri frágreiðing um sosialismu mótvegis kommunismu. Men ein og hvør veit, at sosialisma verður útlagt á nógvar ymsar mátar. Víst siga kommunistar seg at vera sosialistar, men teir avvísa fullkomiliga, at javnaðarmenn hava nakað við sosialismu at gera. Tað sama er mótsetta vegin, og tí hava javnaðarflokkar altíð verið roknaðir sum fremstu fíggindar hjá kommunistum. Og tað var eisini Stalin, sum fór at kalla javnaðarflokkar fyri »sosial-fasistar«, tí eftir hansara meti var lítil og eingin munur millum fasistar og javnaðarmenn.

VIT vita, hvat javnaðarpolitikkur stendur fyri. Og besta dømið um hetta eru nettupp tey skandinavisku londini, sum hava verið leidd av javnaðarmonnum í ártíggir. Sjálvsagt kunnu vera ymsar meiningar um fíggjarpolitikkin, men eingin hevur nakrantíð kunnað sett ein blett á demokratiska sinnalagið hjá sosialdemokratum.

UM hetta hjá Paula bert var tvætl og møsn, so kundi ein bert latið sum einki. Men sum hann sjálvur sigur »er trupulleikin í grundini nógv meira álvarsligur enn so!«

ROYNDIRNAR at gera javnaðarmenn til kommunistar eru ikki nýggjar. Hetta hevur málgagnið hjá fólkaflokkinum gjørt í fleiri ár. Men undan tað hevur vist bert ein flokkur í danska ríkinum gjørt tað sama. Og fyri at lýsa hetta verður her endurprentað ein grein, sum 3. apríl 1937 stóð í »Nationalsocialisten«, sum var vikublaðið hjá danska nasistaflokkinum. Vit fara at biðja lesaran um at lesa hesa grein væl og virðiliga. Greinin lýsir nevniliga heilt væl ta støðu, sum nasistar, ikki bert í Danmark, men eisini í Týsklandi, høvdu mótvegis javnaðarmonnum. Og støðan var í stuttum tann at bólka javnaðarmenn saman við kommunistum, og tískil »pádutta« javnaðarmonnum allar eginleikarnar hjá kommunistum.

MEN vit síggja, at henda greinin, sum er skrivað fyri meira enn 50 árum síðani lýsir til fulnar tey sjónarmið, sum málgagn fólkafloksins hevur lýst í hundraðtals greinum.

OG greinin er eisini 100% í samsvar við hesa lýsing hjá Paula Ellefsen av javnaðarflokkinum og tjóðveldisflokkinum.

HVAT hesin politikkur móti javnaðarflokkinum merkti í Týsklandi og Danmark er óneyðugt at greiða frá. Týski javnaðarflokkurin varð bannaður vegna »landasvik«, ella fyri at vera leigusveinar fyri útlendskar maktir í teirri merking, sum Pauli leggur í hetta orð.

VIT skulu enda við einum vælmeintum ráði til Paula Ellefsen: Halt uppat við slíkum tvætli! Slík skriving hevur hóast alt áður givið tær mest ræðuligu avleiðingar.

TAÐ kann tá ikki vera nøkur sum helst orsøk til at kappast við Dagblaðið á hesum øki!

-i

Týsdagur 21. juni 1988. — Dimmalætting —

EIN VIÐMERKING AFTRAT – í sambandi við verjuspurningin

Seinasta leygardag var í Dimmalætting ein samroða við undirritaða um eina fundarrøð í Norðurnoregi um russiska herflotan.

Blaðmaðurin gav eina útmerkaða lýsing av minari hugsan um hesu viðurskiftir. Tá ein blaðmaður festir eina samroðu á blað, so er heilt naturligt altíð okkurt smáting, sum hesin hevur uppfatað eitt sindur annarleiðis enn ein hevði fyristillað sær. Talan er vanliga um nuancamunir.

Tá kann eg nevna, at sjálvt orðið »leiðusveinar« kann geva eina aðra mynd enn eg hevði hugsað mær.

Alt eftir sum orðið verður lagt út, kundi talan í ringasta fari verið um eina ábending fram imóti, at menn vóru beinleiðis leintir fyri at ganga ørindir fyri fremmandar. Var spurningurin so einfaldur, so var bert at avduka hesar menn.

Trupulleikin er í grundini nógv meira álvarsligur enn so. Tvær av teimum stóru flokkunum á løgtingi ganga av heilum hjarta inn fyri at gera Føroyar til eitt sosialistiskt, ella fyri alt tað eitt kommunistiskt, samfelag við øllum tí sum harav fylgir. Hesir menn biója føroyska veljaran um heimild til at halda fram við at fremja hetta tiltak.

Ríkni politikkurin mótvegis okkara vinnulívi gevur nógv og fullgóð prógv fyri hesum.

Samstundis virka hesir somu flokkar av øllum alvi fyri, at Føroyar skulu gerast leystar av NATO.

Endaliga hava allir samgonguflokkarnir, í mótstríð við sjálva rammuavtaluna, tikið við inn í fiskivinnuavtaluni fyri 1988 við Sovjet eina rað av ørkum aktivitetum enn fiskiskap. Og Fólkaflokkurin tók fult undir við teimum vinstrahallu, sum hann er vanur.

Fáa hesir flokkar teirra vilja, steppa tor at halda fram við teirra politikki, so hava wi, áðrenn langt er fráliðið, eitt Føroyskt sosialistiskt, ella beinleiðis kommunistiskt samfelag uppá minni enn 50.000 sálir, sum er leyst av NATO og vesturheiminum annars, men við nógvum fastum skrivligum, og av Føroya Løgtingi samtyktum, avtalum við Sovjet.

At fyristilla sær, at eitt tílíkt samfelag í miðjum Atlantshavi kann halda seg óbeft, tað svarar eftir mini hestu sannføring til meðalvirðið av tveimum hugtøkum, nevnd utopi og idiotí.

Út frá hesum kann eg endurtaka, at eg eri álvarsliga bangin fyri, at ávísir føroyskir politikkarar beinleiðis virka fyri, at russar av álvara fáa fótin fastan her í Føroyum.

At hetta hevði sett Føroyar í eina heilt aðra støðu enn annars, um álvarsligir trupulleikar stinga seg upp imillum størveldini, tað vísst eg ikki í.

Pauli Ellefsen.

Marxismen.

"Nationalsocialisten" 3 april 1937.

Ikke mindst det hjemlige Socialdemokratis Førere forsøger ved Lejlighed at give det Udseende af, at Socialdemokratiet er Modstander af Kommunismen. Udover den Modstand, der er dikteret af lokalt Brødnid, og som lige udpræget paa begge Sider, findes der ingen Forskel paa de 2 marxistiske Fraktioner. Ved Landstingsvalget stemte Kommunisterne paa Socialdemokratiet og skal nok faa den Regning betalt, som sikkert er anerkendt forud. Ogsaa ved Kommunalvalgene ydede Kommunisterne Socialdemokraterne **værdifuld Støtte. I Aalborg var de 2 Fraktioner i Listeforbund og i Aabenraa lod Kommunisterne være med at opstille og stemte i Stedet paa Socialdemokraterne, der paa den Konto fik et ekstra Mandat. Der er i Aabenraa ikke mange Kommunister tilbage, men da 17 Stemmer mindre paa den marxistiske Liste vilde betyde et Mandat mindre til Marxisterne, behøvede den kommunistiske Støtte ikke at være særlig stor for at give et Resultat.**

Naar socialdemokratiske Politikere ved Lejlighed ynder at paastaa, at de ikke er ude efter den kommunistiske Hjælp og ikke giver noget for den, er det simpelthen Usandhed. Man kan blot for at nævne en Ting, tænke paa den Fortrinsstilling, Moskva - Disciplene har ved den røde danske Radioudsender.

I Paaskedagene holdt de socialdemokratiske Ungdomsforeninger „Kongres" (det skal være fint og udenlandsk) i Odense med selve Statsminister Stauning som Taler. Denne prominente Forsamling af „Proletarer" modtog fra Russer-Partiet en Hilsen, hvori det hedder:

„Danmarks kommunistiske Ungdomsforbund sender vore kammeratlige Hilsener til jeres Kongres i Ønsket om, at D. S. U. som den største antifascistiske Ungdomsorganisation vil tage positive Beslutninger i Kampen mod Fascismen, for Freden, Friheden og Fremskridtet.

Vi tilsiger jer vor fulde Støtte i Hjælpearbejdet for det spanske Folk, og vi vil støtte ethvert Arbejde for en bedre og lykkeligere Fremtid for den danske Ungdom."

Mere varmt og hjerteligt kan det vel ikke være og Udtrykket for fælles Maal i Rusland, Spanien og Danmark kan vel ikke være bedre.

Iøvrigt hæver „Arbejderbladet" „Social-Demokraten" til Skyerne, fordi Bladet igen har begyndt at røre paa sig med Hensyn til Hjælp til de fortsatte kommunistiske Myrderier i Spanien.

Det er rigtigt, at „Social-Demokraten" i nogle Maaneder, siden det store Kup, hvorved Fagforeningerne berøvedes store Summer til Hjælp for Kommunisterne, har været lidt tavmed Hensyn til Spanien. Dette skyldes dog næppe en bedre Erkendelse, men snarere den Modstand, de danske Arbejdere har gjort mod, at deres surt erhvervede Penge uden videre beslaglægges og sendes til Spanien til Brug for de russiske Mordbrændere og samvittighedsløse Slyngler.

Det er muligt, at den danske Regerings kontante Støtte til Bolsjevismen i Spanien er en Kvittering for Kommunisternes Hjælp ved Landstingsvalget. Nu kræves der mere og Regeringen maa betale. Den skal nok komme til det, men den kan ikke vedblive at give det Udseende af, at Socialdemokrati og Kommunisme ikke samarbejder. — Kendsgerningernes Sprog er for tydeligt.

Udbred vort Blad!

Lad det ikke eft. Læsningen hvile paa Dagligstuebordet!

Giv det til Fremder og Venner